# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

# Poul Christiansen 90 ár



Í dag fyllir Poul Christiansen í Havn, millum manna nevndur Poul Málarin, 90 ár. Hann er ættaður úr Porkeri, har hann var føddur og vaks upp. Foreldrini vóru Mortina, fødd Djurhuus og ættað úr Porkeri, og Christian Christiansen, ættaður úr Havn. Pápin, sum flutti til Suðuroyar at arbeiða í handli á ungum árum, var av Dalaslagnum í Havn.

Poul er triðyngstur í einum systkinaflokki, sum taldi sjey. Tey vóru Ella, Hanneba, Sanna, Mikkjal, Poul, Christina og Jona, og aftrat teimum er so eisini fosturbeiggin Bjartur Sumberg, sum kom til teirra, tá hann var bara 14 mánaðir gamal. Av hesum átta eru bert Poul, Jona og Bjartur á lívi í dag.

Barnaárini tíðliga í farnu øld vóru hjá Poul sum hjá teimum flestu. Samstundis sum spæl og hugni áttu sín part í gerandisdegnum, gingu børnini eisini foreldrunum til handar. Eftir at Poul var konfirmeraður, gjørdi hann ymiskt fyrifallandi arbeiði, millum annað í handlinum hjá pápanum, til hann á vári í 1935, bert 17 ára gamal, flutti til Havnar at fara í læru sum málari.

Upprunaliga ætlaði Poul at verða snikkari ella timburmaður, men vónleyst var at fáa nakað lærupláss tá, so í staðin gjørdi hann av at søkja, tá eitt læruplássvar at fáa hjá Andreasi Mouritsen, vanliga nevndur Gubbi, sum var pápi teirra, sum byrjaðu Málingahandilin í Havn.

Í 1951 giftist Poul við Hjørdis, fødd Lamhauge og ættað úr Rituvík, og tey búsettust í Jónas Broncksgøtu í Havn, sum var heim teirra í meiri enn eina hálva øld. Fyrst fingu tey børnini Maritu og Suna, sum hálvttriðja ár er ímillum, og síðani gingu næstan ellivu ár, áðrenn Kirstin sum tað triðja legðist aftrat. Hesi hava givið Poul fimm abbabørn og tvær langabbadøtrar hevur hann eisini.

Heimið hjá Hjørdis og Poul hevur øll árini verið miðdepilin í familjuni í báðar ættir, og bæði innan úr Eysturoynni og sunnan úr Suðuroy hevur verið fast, at tey hildu seg ikki hava verið í Havn, um tey ikki høvdu verið inni á gólvinum í Jónas Broncksgøtu, har hurðin altíð stóð opin og blíðskapurin var stórur.

Bæði tvey vóru tey gávað við góðari heilsu og hartil arbeiðssom. Uppgávubýtið var stilltigandi tikið sum tann sjálvfylgja, at í heiminum ráddi Hjørdis og tók sær av øllum har, meðan Poul arbeiddi úti og stóð fyri tí inntøku, ið krevst í einum og hvørjum húsarhaldi.

Trúfastur hevur Poul verið sum fáur, har hann hevur verið, og tað sást eisini aftur í málarayrkinum, tí í samfull 25 ár arbeiddi hann hjá Gubba, áðrenn hann byrjaði fyri seg sjálvan. Sum málarameistari og arbeiðsgevari hevði hann bæði lærlingar og annað fólk aftrat sær øll árini.

Árini frá 1965 til 1978 høvdu Hjørdis og Poul málingahandilin í kjallaranum í Jónas Broncksgøtu. Eftir at tey lótu handilin aftur, helt Poul tó fram við málaravirkseminum og legði ikki frá sær, fyrr enn hann var farin um tey 70. Tó helt hann í einstøkum førum í fleiri ár fram við at røkja einstakar fastar kundar, ið ikki dugdu við annað, enn at hann tók sær av tí, sum málast skuldi hjá teimum.

Sum handverkari hevur Poul allar dagar verið tiltikin, tí hann var bæði kvikur og vælgjørdur. Ikki minst hava eftirkomarar hansara notið gott av góða handverkinum, og bæði Hjørdis og hann hava fegin lagt nógv fyri, tá tað hevur rátt um at hjálpt børnunum.

At Poul saktans eisini hevði staðið seg sum snikkari ella timburmaður, hevði hann fingið læruplass í síni tíð, hevur hann fleiri ferðir prógvað við umbyggingum og broytingum, bæði heima hjá sær sjálvum og hjá børnunum. Fittur er hann í hondunum, og hann hevur tey góðu evni, at hann altíð sær møguleikar, heldur enn forðingar. Heldur ongantíð hevur hann verið bangin fyri tí nýggja, sum er komið fram, tað veri seg innan amboð, arbeiðshættir og annað.

Seinnu árini eru eyguni farin at bila, men tað hevur ikki forðað honum í at tikið pensilin í hondina, tá brúk hevur verið fyri tí. Og hóast eyguni langt frá eru sum fyrr, hevur alt verið so væl frágingið, at eingin fingur kann setast á nakað, tá arbeiðið er liðugt. Poul er handverkari av tí góða, gamla slagnum.

Poul hevur verið einkjumaður í hálvttriðja ár, tí í november 2004 gjørdist Hjørdis sjúk og fór fyri jól sama árið niður á Ríkissjúkrahúsið. Heilsubót fekst ikki, og tann 20. januar í 2005 andaðist hon, 77 ára gomul. Fyri Poul og familjuna annars var missurin stórur, og tey bæði høvdu jú livað eitt langt lív saman, har tey vóru saman um alt.

Hóast lívið ikki altíð gongur eftir tí beinu linjuni, vit so mangan kundu ynskt okkum, so er ikki annað at gera, enn at royna at koma víðari. Tað hevur Poul eisini gjørt, og síðani hann fyrr í summar flutti á Ellisheimið í Havn, sum hann eisini sjálvur so sera fegin vildi, hevur hann næstan vunnið sær ungdóm av nýggjum, so væl hann trívist har.

Ikki minst tykist hann vera glaður fyri ta føstu rútmu, gerandisdagurin á heiminum gevur. Tað er sum í gomlum døgum, at bæði døgurði og nátturði hava sínar føstu tíðir, og at fáa morgundrekka borið á songina av og á er heldur ikki at forakta. Poul hevur bara tað besta at bera øllum hinum, ið búgva á Ellisheiminum, eins og starvsfólkunum, ið gera alt fyri at skapa góðan trivnað.

Lítið man heldur vera at ivast í, at Ellisheimið við Poul eisini hevur fingið eitt gott húsfólk, tí hann er fróðarmaður burturav, hevur gott minni og dámar sera væl at práta. Sosiala genið er sterkt hjá honum, og best trívist hann, tá hann hevur nógv fólk rundan um seg. Tað hevur hann har, og tí er einki at siga til, at hann er fallin væl til í sínum nýggja heimi.

Hóast eyguni og eisini hoyrnin bila og Poul sigur seg vera farnan at merkja tey mongu árini, er eingin ivi um, at innan er Poul framvegis sum ein unglingi. Altíð klárur við einum brosi og gjarna onkrari góðari søgu. Við so løttum lyndi er maðurin uttan iva førur fyri at bera mong ár aftrat.

Hjartaliga tillukku við runda degnum, Poul!

**frændi**

**Dagurin**
**14. september. Dýrd krossins.** Eisini rópt krossmessa um heystið. Krossurin, sum drotningin Helena fann, Kristi krossur, varð tikin og fluttur burtur av heidningum, men funnin aftur og førdur til Jerusalems.

†

## Andlát og jarðarferðir

**Niels Jacob Hovgaard, Hoyvík** fer til gravar úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin kl. 15.00.

**Elinborg Eriksen, í Keypmannahavn**, ættað úr Tórshavn, dóttir Hanneba í Funningsstovu, andaðist týsdagin, 79 ára gomul. Kórseting verður leygardagin kl.13.00 í Søndre Kapel, Bispebjerg Kirkegård

**Mikkjal Michelsen í Vági** andaðist týsdagin 88 ára gamal. Kistan fer út kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsið fríggjadagin kl. 17. Jarðarferðin verður úr Vágs kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Mikkjal, kunnu lata Eldrasambýlinum í Vági eina gávu.

Kistan við **Helgu Djurhuus**, fer av Lágargarði í kvøld klokkan 18.00 í Kirkjugarðskapellið. Jarðarferðin verður úr Kirkjugarðskapellinum fríggjadagin, klokkan 13.

umhvørvisstovan

# Barnið skal eita Umhvørvisstovan

TÍÐINDASKRIV

Umhvørvisstovan er nýggja felagsheitið á teimum seks stovnunum, sum 1. juni vórðu lagdir saman. Stovnurin hevur eisini fingið nýtt búmerki, ið birtir uppundir felags samleika.

Í nýggju Umhvørvisstovuni eru savnaði: Matrikulstovan, umhvørvisdeildin á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, Føroya Náttúrugripasavn, Skógrøkt Landsins, Tinglýsingin og Landsfólkayvirlitið.

- Av tí at okkara arbeiðsøki er so breitt, var tað umráðandi at finna eitt heiti, sum megnar at savna og lýsa okkara umfatandi virki undir einum. Tað ger orðið umhvørvi í breiðum týdningi, og tí halda vit, at Umhvørvisstovan er eitt einfalt og gott navn til nýggja stovnin, sigur Jákup Pauli Joensen, stjóri á Umhvørvisstovuni.

Umhvørvisstovan kann lýsast sum ein náttúru-, umhvørvis- og lendisfyrisiting. Samanlagdu stovnarnir fevna sostatt um eftirlit, umsiting, gransking, skráseting, upplýsing, ráðgeving, rannsóknir, roynd- ir, ognarviðurskifti, kort við meira.

### Búmerki – felags samleika

Umhvørvisstovan hevur eisini fingið eitt nýtt búmerki.

Nýggi stovnurin arbeiðir við náttúru, umhvørvi, fólki og kortum, og tí hevur stovnurin valt eitt búmerki, sum er organiskt og livandi við bleytum skapi. Búmerkið, sum í litútgávu hevur ein frískan grønan lit, gevur ymisk hugasambond – eitt nú til vegakervi, æðrasteingir, matrikulkort, plantutrevjur, røtur og so frameftir.

Umhvørvisstovnurin heldur til í bygninginum á Argjum, har Frímerkjadeildin áður húsaðist. Enn eru ikki allir partar av stovninum komnir undir